**TRÚGVANDI MAÐUR**
Mitt í 50-unum, ynskir samband við kvinnu, ið vil fáa tað gott og trygt saman við mær. 100% tagnarskylda.
Billmrk.: 750087

## Sjavs

**ALMENN SJAVSKAPPING**
verður í Menningarfelagshølunum við Gøtugjógv, sunnudagin 16. januar kl. 15. At vinna verða minnislutir og ferðasteyp. Tilmelding óneyðug.
Gøtu Menningarfelag

**SJAVSKAPPING**
Svavskapping verður á Svangaskarði mánakvøldið 17. jan. kl. 18.30.
B68

**SJAVSKAPPING**
Almenn sjavskapping verður á Café Blákross týsdagin 18. jan. kl. 19.

**SJAVSKAPPING**
verður á Strondum sunnudagin 23. jan. kl. 18. Leikarar millum 4 tey bestu pørini fáa steyp til ognar. Spælt verður um ein vikuskiftistúr fyri 2 til Danmarkar við Atlantsflog. Tilmelding ikki neyðug.
Strálan

## Súkklur

**EIN HARRASÚKKLA**
12 gear lítið brúkt - fyri 1.000 kr. Tvær motorsúkklutaskur til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 318434

**GÓÐ NÝGGJ SÚKKLA STOLIN**
Tú sum veit hvar hon er verður vinaliga biðin at seta hana aftur í skýlið ella at ringja .
Tlf. 361617

**PRUTL TIL SØLU**
Puch maxi.
Tlf. 317996 & 283996

**SÚKKLUR**
Søkt verður eftir einum forgaffili til eitt 30 ára gamalt Puch MS50 prutl.
Tlf. 315526, helst aftáná kl 17.

**SÚKKLUR**
3 Winther barnasúkklur bíliga til sølu.
Tlf. 333354

**TIL SØLU**
Ein area 51 skootari til sølu fyri 16.000 kr.
Tlf. 441168 eftir skúlatíð

**YAMAHA**
Skutari til sølu. Hevur koyrt 6.500 km. er í sera góðum standi fyri 9.800 kr.
Tlf. 313446

**YAMAHA SCOOTARI**
til sølu fyri 12.000 kr.
Tlf. 312305 eftir kl. 16

## Teldur

**EIN NINTENDO 64 TIL SØLU**
fyri 2.500 kr. við 6 spølum. Super Mario, Mario Kort, Mario Party, Lanburgini, Top gear Rally, International Superstarscoocer, 2 joystick, ein controter pak.
Tlf. 317949

**FARTELDA**
Toshipa, 133 MHZ, 32 MB Ram, 1,3 GB HD, PC mcia net kort, ms. office til sølu fyri 8.500 kr.
Tlf. 320244 & 311616

**NINTENDO 64**
við 2 joystickum og spølini, Super Mario - Mario Kart - Fighers Desteny og Dark Rift, til sølu fyri 1.300 kr.
Tlf. 317198

**PENTIUM III**
450 MhZ, 8,2 GB-HD, 19" skerm, kort, 5 x dvd, tráðleyst keyboard og mús, modem 56000, 64 MB-ram, nøkur program, til sølu fyri 15.000.
Tlf. 455142

**PLAYSTATION**
Lítið brúkt Playstation v/ einum spæli (Rayman) til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 314952

**SONY PLAYSTATION**
1 memo kort, Anolog Joystick verður bert selt samlað. 15 ymisk spøl, kunnu seljast hvør sær. Granturismo, Resident Evil 1 og 2 World Cup 98, Panzer General og nógv onnur.
Tlf. 319676 Petur

**TIL SØLU**
Zildjian Z Custom Mega Bell Ride 21", 1 ára gomul sum nýggj, nýpr. kr. 2.700 kr., til sølu fyri einans kr. 1.700 kr. tlf: 361040, mobil: 211044, e-mail: hjalt@forum.dk

**TIL SØLU**
Canon Btc - 4400 litprintari, lítið og onki brúktur, til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 373860

**YNSKIST**
RAM og eyka lutir til ein gamla IBM ThinkPad 720 farteldu. Skriva til: sueroy@post.olivant.fo ella ring tlf: 448261

## Tónleikur

**BARNATRUMMUSETT**
ynkist til keyps. Ring í arb. tlf. 311820 og spyr eftir Torkil, heima eftir kl. 17.00 tlf. 317638

**BASSGUITAR TIL SØLU**
Svartur Maison bassguitari til sølu fyri 2.500 kr. v/ tasku er lítið brúktur, sær út sum nýggjur.
Tlf. 210246

**KLAVER YNSKIST**
til keyps.
Tlf. 318970 eftir kl. 17

**MANDOLIN TIL SØLU**
Ein vælhildin mandolin av slagnum Aria, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 314384 & 286653

**TIL SØLU**
Ein vælhildin Banjo við 5 streingjum av slagnum Washburn til sølu fyri 4.500 kr. kuffert fylgir við.
Tlf. 314384 & 286653

**TIL SØLU**
Eitt standard TAMA trummusett til sølu.
Tlf. 444440 eftir kl. 15.30, spyr eftir Rógva

## Ymiskt

**TRÁÐLEYS TELEFON**
til sølu, av merkinum Schneider CP-999 900 MHZ, við ymiskum hentleikum, fyri 500 kr.
Tlf. 319263

**APEX-FERÐASEÐIL**
Vágar-Keypmannahavn-Vágar, til sølu.
Tlf. 441674

**B68**
BOKSING ÚTSTÝR
Pro. boksisekkur (20 kg)=2.475 kr.
Pro. boksisekkur (25 kg)=2.575 kr.
Pro. boksisekkur (35 kg)=2.775 kr.
Pro. boksihandskar= 700 kr. Allir sekkirnir eru professionellir, og gjørdir av kraftigum Canvas, við leður forsterkningum í báðum endum, teir leverast við fylli og upphengi. Leveringstíð ca. 10 dagar
Tlf. 283838 kl. 16 og 20

**B68 FÓTBÓLTUR**
Innandura-kapping verður í ítróttarhøllini í Runavík fyri menn 16 ár og eldri, vikuskiftið 5.-6. februar.
B68

**B68 FÓTBÓLTUR**
Innandurakapping verður í Ítróttarhøllini í Runavík fyri yngru deildir, vikuskiftið 4.-5. mars.

**EIN ERICSON GF 788**
v/eyka battarí - bil og heimaladara o.a. til sølu.
Tlf. 210346

**FARTELEFON**
Ericsson T185 GSM fartelefon 1/2 ára gomul, til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 210246

**FARTELEFON**
Ein Motorola NMT 900 fartelefon. Ringir og ristir, við borðladara til sølu fyri 1.000 kr. nýprísur 3.000 kr.
Tlf. 333445 & 211445

**FRÁ NSÍ**
Innandurakapping fyri kvinnur og menn. Fyrsta innandura fótbóltskappingin í ár 2000 verður í høllini í Runavík leygardagin 15. januar. Nýtt verða stór mál. Á hvørjum liði 5 leikarar +1. Luttøkugjaldið er 300 kr. fyri liðið. Tilmeldan á tlf. 448100 mánadag til hósdag ímillum kl. 19 og 21.
NSÍ

**FRYSTIBOKSIR**
3 boksir við glasloki til sølu.
Tlf. 315528

**INNANDURAKAPPING**
í fótbólti verður í døgunum 12. - 13. feb. fyri Shell-cup fyri yngri deildir í høllini á Kambsdali. Seinasta freist at tekna seg er týsdagin 8. februar á
tlf. 445132 eftir kl. 18:00
ella tlf. 444845

**MÁLNINGUR**
eftir Kristin í Geil. Stødd 57x36 cm. til sølu fyri hægstbjóðandi.
Tlf. 310117 eftir kl. 18

**NÝGGJUR**
brenniovnur til sølu.
Tlf. 217825

**PHILIPS TWIST**
GSM fartelefon til sølu v/ ladara + eyka battarí, alt fyri 500 kr.
Tlf. 314952

**SJÓNVARPSKORT TIL SØLU**
TV Phone 98 kort við danskari vegleiðing og fjarstýring. Ongantíð brúkt. 700 kr.
Tlf. 213024

**TEORISKEIÐ FRÁ**
Olla í Lágabø Tórshavn, til sølu. Prísur 1.900 kr.
Tlf. 373503

**TERMORÚTUR TIL SØLU**
Nýggjur klárur termorútur í støddini: 67,2 b og 102,2 h, til sølu.
Tlf. 317365

**TIL LIMIRNAR Í STÍGUM FAST**
Tey, ið ætla sær við til ársveitslu Dansifelag Kaggans tann 5. febr. skulu siga frá á tlf. 361402 í seinasta lagi 19. jan.
Nevndin

**1 APEX-FERÐASEÐIL**
Vágar-Keypmannahavn og aftur, til sølu.
Tlf. 373082

**VIDEOFILMAR**
Nógvir videofilmar til sølu.
Tlf. 220499

nøvn nú nøvn nú

## Heilsanir



***Góðasta Helena!***
Hjartaliga tillukku við tínum 3-ára føðingardegi, ið var tann 6. januar. Muss og klemm *frá* ***mammu, babba og Anniku***



***Góða Maria***
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum. Jesus pápi signi framtíð tína. *Ynskja* ***Miaomma, Jóni-abbi, gubbi og mostur***



***Góði Petur***
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum sum var 15. januar.
*Heilsan* ***frá okkum Karolina***



***Góði Andrias***
Hjartaliga tillukku við degnum 18. jan. Eisini ein heilsan til Abraham sum fylti í desember.
*Ynskja* ***mamma og babba***

nøvn nú 5 ferðir um vikuna 20,- kr.

GEVIÐ GÆTUR:
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr.
í ❑ frímerkjum, ❑ krossaðum kekki
fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: ..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................

MYNDINA AFTUR: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

*Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.*

Sent hevur **(skal fyllast út).**
Navn: ..........................................................................
Bústaður: ..........................................................................
Bygd/býur: ............................ Tlf.: ...............

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»NØVN NÚ«**





# Ferðin um bláu gongustjørnuna

*Fyri jól kom út snotilig bók eftir Duritu Holm*

Meðan eg nú í tveir dagar havi ligið við krími, havi eg kortini havt yvirskot at lesa bókina. Satt at siga, so er ferðafrásøgnin hjá ungu Heimasandsgentuni ikki sørt heilsubót bæði so og so. Eg fari ikki at ummæla bókina út í æsir, tað duga onnur betur enn eg, men eg vil fegin á henda hátt vísa mítt takksemi til fólk sum Duritu.

Beinanvegin, tú fert undir lesingina, so leggur tú til merkis, at stílurin er reinur og á ongan hátt uppgjørdur. Tú møtir einum ungdómi, ið hevur sjálvsvirðing og á ongan hátt kennir trongd til at gera seg upp, hvørki tá tað snýr seg um málbrúk ella innihald.

Bókin er frá byrjan til enda lívsjáttandi. Ongar hendingar eru so ringar og keðiligar, at Durita ikki á ein ella annan hátt fær snarað tær til tað góða. Vit kunnu spyrja, hvussu ber tað til, at Durita so gott sum ongantíð møtir óreinskapinum í verðini? Hvussu ber tað til, at Durita bara møtir tí góða hjá teimum »primitivu« fólkunum víða um í heiminum? Í heimspressuni hoyra vit næstan bara um tað ringa og ljóta úti í heimi. Fjølmiðlafólk, sum í grundini stýra mannahugsanini, kenna ikki til vakurleika, góð fólk og positivitet millum manna. Men Durita harafturímóti møtir vakurleika, kærleika, gestablídni og góðum fólki, har vit onnur billa okkum inn, at ræðsla, mannahatur og alt ringt er dagligi kosturin.

Soleiðis, sum eg málaði mítt fyrsta innfall omanfyri, so heldur tú kanska, at Durita er ikki sannførandi. At hon bara vil mála eina falska mynd av heiminum. Men, tá tú lesur bókina, so ásannar tú óivað, sum eg, at Durita veruliga er ein menniskja, ið dugir at seta í virði tað góða. Hon er kosmopolit og góðtekur ikki sjálvgóðskuna og sjálvrættvísina hjá okkum »kristnu« í »framkomna heiminum«.

Meðan tú lesur bókina verður tú meira og meira hugtikin av hesi ungu gentuni. Hon fór ofta út í nakað, sum hon, tá saman um kemur, als ikki var harri yvir. Ofta var lukkan størri enn skilið, og tað viðgongur hon gjarna, men vit uppliva eisini, at hon skjótt gerst ein rættur, skilagóður skipari, sum fáir gera henni eftir.

At hon so eisini letur kærleikans kraft millum tvey fara av stað við sær mitt í lívsverki sínum, vísir eisini nakað serstakt við menniskjanum, vit tala um. Maður og dóttir gerast eisni veruleiki í stóra ævintýrinum. Spurningurin er ikki um ráða og skilagóða skiparan, sum fær alt at bera til, tí hon brúkar vit og skil, men menniskja, ið fær alt at bera til, tí viljin at liva lívið í góðum samlag við onnur er samskipað við vitið og skilið.

Hon sýnir eitt ótrúligt sjálvsálit; eina sjálvsvirðing, sum mong kunna øvunda henni. Tað eru bert slík fólk, sum veruliga kunnu sýna øðrum fólki virðing og samkenslu, og tað ger Durita.

Sum sagt í byrjanini, so ætlaði eg ikki at ummæla bókina, men harafturímóti mæla øllum til at lesa hesa lívsjáttandi bók. Hon er løtt at lesa hjá einum og hvørjum.

Tá eg nú omanfyri bæði havi lovprísað stílinum í bókini og innihaldinum, so fari eg kortini at loyva mær at koma við einum vælmeintum ráðum: Læt onkran sakkønan rættlesa bókina, áðrenn næsta útgáva kemur. Tað er nógv størri skomm einki at skriva, og serstakliga, tá ein annars dugir væl at málbera seg, enn at lata úr hondum tekst við onkrum stavvilum, men tað verður avgjørt ein fyrimunur, at onkur kønur í fakinum ansar eftir, at stavvillurnar verða fyribeindar, áðrenn 2. útgáva fer til prentingar.

Eg kann avgjørt mæla til at brúka bókina í framhaldsdeildini, men kanska er tað kortini vert at bíða eftir aðru útgávu, tí tað er ørkymlandi at lesa annars góðan tekst, sum ikki er rættlisin.

**Hans Jørgensen**




### Føroyingafelagið í Århus

***Vestergade 48 D***
***8000 Århus***
***Telefon og fax: 86180604***
***Teldupostur:***
***aarstova@teliamail.dk***
***Heimasíðan:***
***http://welcome.to/aarstova***

Áarstova er opin aftur sum vanligt eftir jólafrítíðina. Caféin letur upp 10. januar og fríggjakvøldsbarrin 14. januar. Barnaskúlin og sunnudagsskúlin byrjar aftur ávíkavist ólíka og líka vikur fyrst í september.

**Opið er soleiðis:**
Mánad.-hósd.: kl. 16-18
Fríggjakvøldscafé: kl. 21-03
Limir ókeypis atgongd. Onnur kr. 10,-

**Reglulig tiltøk:**
Føroyskur barnaskúli annanhvønn leygardag (ólíka vikur) kl. 11-14.

**Sunnudagsskúli:**
Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag kl. 14.30 (líka vikur).

**Bókasavn:**
Føroyskar bøkur kunnu lánast í Áarstovu mánadag-hósdag kl. 16-18.

**MFS:**
Meginfelag Føroyskra Studenta hevur opið í Áarstovu hvønn mikudag kl. 16-18.
Telefon: 86 13 18 61
Telefax: 86 18 06 04.

**Flogbóltur:**
Frydenlundskúlin fríggjadag kl. 16-18. Bussur 4.

**Svimjing:**
Frydenlundskúlin fríggjadag kl. 18-19. Bussur 4.

**Badminton:**
Frydenlundskúlin sunnudag kl. 16-18. Bussur 4.

**Innandura fótbóltur:**
Hasselager Hallen fríggjakvøld kl. 21-23. Bussur 15.

### Føroyingar í Noregi

E-mail:
føroyar@norden.no
Heimasíða:
http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

### TIPS 13 úrslit

Vika 2
15.–17. januar 2000

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Arsenal–Sunderland | 1 |
| 2. | Chelsea–Leicester | X |
| 3. | Coventry–Wimbledon | 1 |
| 4. | Everton–Tottenham | X |
| 5. | Middlesbrough–Derby | 2 |
| 6. | Sheffield W.–Bradford | 1 |
| 7. | Watford–Liverpool | 2 |
| 8. | West Ham–Aston Villa | X |
| 9. | Birmingham–Norwich | 1 |
| 10. | Blackburn–Huddersfield | 1 |
| 11. | Crystal Palace–Barnsley | 2 |
| 12. | Grimsby–Nottingham F. | 1 |
| 13. | Queens P. R.–Bolton | 2 |

Prognosa

| | |
|---|---|
| 13 røtt: | 63.695,- kr. |
| 12 røtt: | 1.263,- kr. |
| 11 røtt: | 117,- kr. |
| 10 røtt: | 23,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

### TIPS 12 úrslit

Vika 2
15.–17. januar 2000

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Newcastle–Southampton | 1 |
| 2. | Manchester C.–Fulham | 1 |
| 3. | Inter–Cagliari | 1 |
| 4. | Juventus–Perugia | 1 |
| 5. | Lecce–Parma | X |
| 6. | Piacenza–Torino | 2 |
| 7. | Reggina–Lazio | X |
| 8. | Roma–Verona | 1 |
| 9. | Alzano–Sampdoria | 2 |
| 10. | Brescia–Cosenza | 2 |
| 11. | Cesena–Atalanta | X |
| 12. | Salernitana–Treviso | 1 |

Prognosa

| | |
|---|---|
| 12 røtt: | 14.858,- kr. |
| 11 røtt: | 479,- kr. |
| 10 røtt: | 44,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VALUTAKURSIR

| | | 17.01.00 | Ultimo desember |
|---|---|---|---|
| USA | Dollarar | 735,5600 | 741,2500 |
| Bretland | Pund | 1203,8000 | 1197,8800 |
| Týskland | Markur | 380,5600 | 380,5900 |
| Svøríki | Króna | 86,9100 | 86,9400 |
| Noreg | Króna | 92,0500 | 92,1300 |
| Frakland | Frankur | 113,4700 | 113,4800 |
| Belgia | Frankur | 18,4510 | 18,4520 |
| Sveits | Frankur | 461,3600 | 463,5700 |
| Holland | Gyllin | 337,7500 | 337,7800 |
| Italia | Liri | 0,3844 | 0,3844 |
| Finnland | Markur | 125,1800 | 125,1900 |
| Ísland | Króna | 10,1800 | 10,2200 |
| Eysturríki | Skillingur | 54,0910 | 54,0950 |
| Spania | Pesetas | 4,4730 | 4,4740 |
| Portugal | Escudos | 3,7130 | 3,7130 |
| Kanada | Dollari | 506,9900 | 510,6400 |
| Grikkaland | Drakmur | 2,2500 | 2,2540 |
| Japan | Yen | 6,9993 | 7,2599 |
| Írland | Pund | 945,0800 | 945,1400 |
| | Evra | 744,3100 | 744,3600 |

FØROYA SPARIKASSI